Nr. 244 - 23. desember 2003 Sosialurin Jóla- og nýggjársblaðið 51

# Nýggjársynski

**Sonja Jógvansdóttir, blaðkvinna:**



Tja nýggjársynski, tað ljóðar helst gott at siga "friður á jørð og í menniskjum góður tokki".

Tað er mítt ynski fyri heimin.

Persónliga vóni eg, at eg kann missa fimm kilo, tí so ivist eg ikki í, at eg verði nógv, nógv lukkuligari. Nei tvætl, kanska kundi eg verðið eitt sindur meir árvakin, tá ið eg eri saman við fólki. Fái mangan skotið í skógvarnar, at eg ikki eri tilstaðar í hugaheiminum, tá ið vinir og familja tosa við meg. Summi teirra halda, at tá eg fari undir grønu torvu, skal eg malast til sovitablettir.

*Framhald av síðu 48*



*Orthank. Mynd eftir brøðurnar Hildebrandt*

síggja verkið sum leyst frá hendingum í 20. øld.

Sum fyrr nevnt var Tolkien við í bardøgunum við Somme, har o.u. 600.000 enskir hermenn lótu lív. Tolkien segði seinni, at hann ongantíð gloymdi, hvussu fátækir enskir arbeiðarasynir í hesum bardaga - hóast teir ikki høvdu hug til kríggj og hóast dirvið mangan treyt - kortini, í ræðuligum skotgravarkríggi, vágaðu lívið fyri sítt land. Á sama hátt letur hann í Ringanna Harra hobbarnar, Periannath, teir veikastu og minstu, smáfólkið á ong og millum heyga, í stríðnum móti Sauron taka ta tungastu byrðina á seg.

## TANN FØROYSKA ÚTGÁVAN

HÓAST FØROYSKIR høvundar longu fyri meira enn hundrað árum síðani skrivaðu eitt mál, sum var modernað, hevur føroysk týðing líka til í dag havt trupulleikar, sum helst standast bæði av orðavali og setningsgerð, við at koma á tal við lesaran.

Av somu orsøk er tað ein gleði at staðfesta, at tann føroyski týðarin hevur megnað at skapa eina endurgávu av tekstinum, sum at kalla onga frástøðu elvir millum lesara og tekst. Uppgávan hevur neyvan verið løtt, og eg giti, at Axel Tórgarð hevur hugsað ikki lítið um stíllegu og tóna, at finna eina fyrimynd, sum bæði hevur rúm fyri tí sagnar-, hetju- og ófrættakenda í skaldsøguni og talar til nútíðar lesarar, ikki minst ungdómin. Hetta, haldi, hevur sum heild eydnast honum.

Eg fari at nevna tvey dømi, sum kunnu lýsa útmørkini í hesi avbjóðing. Fyri "mánaðin" í árinum brúkar týðarin sniðið "máni", hetta er eftir mínum tykki rætt, tí í talaðum máli er eingin munur millum sniðini, hóast vit í samansetingum hava brúk tí fyrra sniðinum. Teir óhugnaligu Nazgûl hevur føroyski umsetarin valt at rópa "ringhamar". Upprunaorðið hjá Tolkien er *ringwraiths* (av angulsaksiskum: *writhan*), sum merkir: yvirsjón, fólk sæð í hamferð. Tann føroyska týðingin er sostatt bæði neyvari og nærri upprunamálsins ófrættadámi enn tað danska "ringånder".

## ÓNDSKAPUR OG VALD

SUM LONGU nevnt ger høvundurin í formælinum til Ringanna Harra greitt, at skaldsøgan ikki skal fatast sum sipandi til tann stóra bardagan móti nazismuni, sum brimaði um tað mundið partar av bókini vórðu skrivaðir. Og sjálvsagt mugu vit geva høvundinum rætt, tá ið hann sigur, at hann ikki medvitið hevur havt eina slíka søguliga tilsiping í huga. Hinvegin eru granskarar, sum halda, at hetta verk ikki hevði kunnað verið skrivað í aðrari tíð enn tjúgundu øld.

Sum prógvgrund fyri hesi hugsan kann verða ført fram, at ávís viðurskiftir tykjast sprottin úr veruligum hendingum. Tað Mordor, sum Fróði og Sam ferðast ígjøgnum á teirra endaligu ferð fram ímóti Orodruin, er t.d. meinlíkt tí oydna og brenda landslagnum við Somme, sum tað sá út, eftir at tað ræðuliga skotgravarkríggið í 1916 var av. Og virkisgarðurin eystan fyri Gondor, sum ongantíð verður brúktur, kann fáa hugan at leita til Maginot-linjuna hjá Fraklandi, sum týskurin fór norðurum, tá hann gjørdi innrás í Frakland í 1940.

Men størri týdning enn slíkir staklutir hevur tað, at einki ríki undan tjúgundu øld hevur framt so radikalan óndskap og trælabundið sítt fólk við so óavmarkaðum eftirliti sum Týskland undir Hitleri, USSR undir Stalin og - í nýggjari tíð - Irak undir Saddam Hussein. Tolkiens myrka Mordor-varsjón hevur alment gildi, men speglar samstundis aftur, næstan út í æsir, henda óndskap og hetta eftirlit.

Ikki minni áhugaverd er hansara varsjón av teimum níggju ringhamunum, Nazgûl, sum ikki hava hold ella kropp, men kortini bera brynju og hjálm og ferðast í lofti á andskræmiligum veingjaðum drekum. Ein slík hugbirting kann sjálvandi standa einsamøll, sum sjálvstøðug skaldslig skapan. Men hesi skepilsir, sum hava latið Sauron fáa bæði sál og likam, og sum nú eru mest sum hylkir, eru tey ikki ein frálík mynd av tí hugmyndafrøðiliga ráksnúninginum, sum hevur verið so sjónskur í tjúgundu øld?

Tað, sum ger Tolkiens lýsing serliga áhugaverda, er tað ljós, hann varpar á sambandið millum óndskap og vald. Ringurin ímyndar valdið og megnar at tøla ikki bara Sauron, men eisini mangar í ringliðnum, og eisini mong av teimum góðu. Hvørki Sam ella Bilbo eru óávirkaðir av ringsins árini, Galadriel veit av hansara tølandi mátti, Gandálvur ræðist hann, og Boromir er seinast í hesum fyrsta bindi fyri falli, av andaligum slag, av ringsins ávum. Og heldur ikki ringberin sleppir undan at glímast við hansara vald:

*Hann hoyrdi seg sjálvan rópa:* Aldri, aldri. *Ella var tað:* Ja, eg skal koma? *Hann visti tað ikki. Sum eitt snarljós frá einum øðrum valdi kom ein onnur hugsan í sinni hansara:* Tak hann av! Tak hann av! Býttlingur, tak hann av! Tak ringin av aftur!

Henda serliga varsjónin av óndskapi og valdi ger Ringanna Harra til ein ringviðgerð, sum í høvuðsheitum og á radikalan hátt víkir frá øðrum ringverkum, eitt nú Wagners ringi, Nibelungenlied, Vølsungasøgu og Sjúrðarkvæðunum. Í stuttum kunnu vit siga, at Tolkien í sínum verk bæði gevur tí fría viljanum innivist og samstundis noktar at lýsa óndskapin sum nakað, ið bara finst í Hinum Partinum. Víst er tað neyðugt, at bæði álvar, dvørgar, menniskjur og hobbar, bæði trø og fuglar, bæði Gondor og Rohan fylkjast til stríð ímóti Myrkursins Drotti. Men líka so neyðugt er tað, at tey stríðast ímóti teirra egna, innara Sauron.

*J.R.R. Tolkien: Ringanna Harri. I. Ringliðið. Axel Tórgarð týddi. Myndprýðing eftir Trónd Patursson. Kort eftir Christopher R. Tolkien, Stephen Raw og Hans Tórgarð. Bókin er sett, prentað og innbundin av Hestprenti. Kostnaður 350 krónur, serligt jólatilboð 300 krónur. Forlagið Stiðin 2003.*











